# land í Saksun





*3-mastrað bark*

Sama dag skrivar amtið eisini til rentukamarið í Keypmannahavn:

*Herved giver jeg mig den Ære til det Høje Kollegium ærbødigst at indberette, at her afvigte $3^{\text{die}}$ Februar d. A. indstrandede til Strømø Syssel, under Bygdelauget Saxen, et stort tremastet Skib, benævnet Broom – Glasgow, uden levende menneskers medfølge, med brækkede Master og Bugspryd og uden Sejl eller Takkelage.*

*Da dette Skib var indstrandet saaledes at det vilde være aldeles umueligt, nogensinde at faae det flot igen, saa traf jeg strax fonødne Foranstaltninger for at dets indehavende Ladning, der alene bestod af Tømmer, saa vidt muligt kunde blive bjærget, og er til dette Øjeblik bragt i Land omtrent en 700 til dels meget svære Fyrrebjælker, men da Strandingsstædet er en af de værste Brændingspladser her i Landet, saa har Bjærgningen baade været meget besværlig og tillige medtaget lang Tid.*

*Foruden hele Skibsskroget formenes endnu at være tilbage at bjærge omtrent 2 – 300 Bjælker.*

*Forøvrigt har endnu intet fremment Skib været her i Havn, men flere Fiskerskibe ere sete fra Landet af.*

## Uppboðssølan

Treytir fyri uppboðssøluni blivu skrivaðar og vóru tær hesar:

Conditioner

*1.*
*Efter Hammerslaget henhviler det Bortsolgte for Kjøberens egen Regning og Risico.*

*2.*
*Enhver der agter at byde paa det bortsælgende Vrag, formodes forud at have gjort sig bekjendt med des Beskaffenhed, da ingen klage om sammes qualitet efter Hammerslaget tages til følge.*

*3.*
*Betalingen erlægges efter tilstillet Regning i det seneste inden 12 Uger fra Dato, i Rigsbankspenge Sedler og Tegn, til Auctionsdirektøren.*

*4.*
*Uvederhæftige Kjøbere maae stille antagelig Kaution om der paa deres Bud skal Reflecteres.*

*5.*
*Auctions og Incassations Salarium med dertil hørende betales af Kjøberne, og bliver saadant specielt anførtpaa enhvers Auctionsregning.*

*6.*
*I Tilfælde af Udeblivelse med Betalningen, maa Kjøberen lade sig søge ved Thorshavns Forligelses Commision og lide Dom ved Strømø Ting, som rette Forum, uanseet de maatte bo udenfor disse districter.*

*Færoe – Amts Contoir d, 5 Maj 1828*

*Tillisch*

Væl hevur gingist at bjarga. Sum ætlað verður longu hin 8. og 9. mai hildin uppboðssøla í Saksun. Fólk eru komin saman úr øllum Føroyum. Har hevur verið ein fólkahópur sum neyvan, hvørki fyrr ella seinni, er sæddur í Saksun. Timbur var tá í tíðini altíð ein trotavøra í Føroyum, og var her ein kærkomin møguleiki at keypa gott timbur. Hetta er stutt eftir at napoleonskríggini, har sambandið við útheimin hevði verið sera vánaligt. Mikkjal Müller er har og keypir. Tilfarið til Müllers hús í Havn, sum hann letur smíða, er ætlandi keypt á hesi uppboðssøluni, og helst er kúgveygað, sum hann letur seta í veggin oman ímóti Bursatanga, av skipinum Broom. Pól á Látrinum er har og mykinesmenn og gásadalsmenn og kunoyingar og kalsoyingar eru har og keypa. Havnar kirkja keypir, Argja hospital keypir og er tað tilfar ætlað til Gamla hospital. Einstaklingar úr øllum Føroyum eru komnir at keypa.

Nógvar av gomlu trækirkjunum verða smíðaðar um hetta mundið og hava fingið timbur frá Broom. Petur Petersen skrivar um Hvalvíkar kirkju í bókini um gomlu trækirkjurnar, sum J. P. Gregoriussen gav út í 1995:

“Av nýggjum tilfari varð keypt pommersk fura, sum seld varð á uppboðnum í Saksun í mai 1828, árið fyri sum kirkjan fórst. Barkin Broom úr Glasgow fór á land í Saksun við fullari last av viði og varð vrak. Hetta er fyrsta floks viður, og tí verður í meira lagi av nýggjum tilfari nýtt, og gamal viður seldur il privatmenn.”

Hvussu tað gekst manningini hevur mær ikki enn eydnast at fáa uppspurt. Vónandi varð hon bjargað og er komin heim í øllum góðum.

**Keldur**

Landsskjalasavnið div. skjøl
J. C. Svabo, Inberetninger fra en Reise i Færøe 1781 og 1782, Keypmannahavn 1959
J. P. Gregoriussen, Gomlu trækirkjurnar, Forlagið í Støplum 1995

Tøkk til Annu Sofíu í Vági fyri hjálp at lesa.



*Kirkjan í Hvalvík*